## Verri enn hildið

Samstundis sum tað frættist úr fleiri londum, at tann búskaparliga kreppan er um at hasa av, og at vend er komin í, ásanna danskir myndugleikar nú, at støðan hjá tí danska búskapinum er verri, enn fólk hava hildið. Eitt nú høvdu politikararnir og búskaparfrøðingar væntað, at bruttotjóðarframleiðslan fór at minka 1,5 prosent í øðrum ársfjórðingi í ár, men nú tey endaligu tølini liggja á borðinum, vísir tað seg, at afturgongdin var heili 2,6 prosent, sigur DR. Orsøkin er sambært teimum serkønu, at bilasølan er framvegis í botni, og at danir keypa minni sum heild nú enn fyrr.



# Jihadgás í Uttanríkisráðnum

**Hákun minimus Snýs tær baby starvast í Uttanríkisráðnum, og starvsheitið er Jihadgás. Soleiðis sá út á heimasíðuni hjá Uttanríkisráðnum í gjár. – Slíkt eigur ikki at finna stað, sigur Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri**

MISTAK
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

*Hákun Djurhuus eitur í løtuni Hákun minimus Snýs tær baby á heimasíðuni hjá tykkum, og eg síggi á síðuni, at tín deild hevur ábyrgdina av heimasíðuni. Hvussu vilt tú greiða frá tí?*

– Ná? Ok? Tað mugu vit gera nakað við. Takk fyri, at tú ringdi.

Upplýsingarnir koma týðiliga óvart á Sigmund Ísfelt, deildarstjóra fyri alment diplomati í Uttanríkisráðnum, sum sambært heimasíðuni hjá Uttanríkisráðnum tekur sær av heimasíðuni.

Men Sigmundur Ísfelt lovar at venda aftur, tá hann veit, hvat gongur fyri seg.




*Soleiðis sá undirsíða á heimasíðuni hjá Uttanríkisráðnum út beint eftir klokkan 14 í gjár*
*Mynd: Rógvi Nybo*

Tá heimasíðan verður tikin inn av nýggjum lítla løtu seinni er navnið hjá Hákuni J. Djurhuus aftur rætt og starvsheitið er aftur stjóri.

### Eitt mistak

Rúma tíð seinni, tá Sigmundur Ísfelt hevur kannað, hvat hendi, greiðir hann frá, at hetta var eitt flovisligt mistak.

– Tað var onkur, sum sat og spældi sær við heimasíðuna og ikki var greiðir yvir, at hetta fór út. Hetta er sjálvandi eitt mistak. Eitt flovisligt mistak, staðfestir Sigmundur Ísfelt.

Spurdur hvørjar avleiðingar tað fær, staðfestir deildarstjórin við ábyrgd av heimasíðu, at viðkomandi, sum hevur verið atvoldin til hendingina ikki verður uppsagdur, men sjálvandi fær at vita, at hatta ikki ber til.

### Uttanríkiráðharrin dámar illa

Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, staðfestir, at støðan við heimasíðuni í gjár var keðilig.

– Eg kenni ikki til málið, men slíkt eigur ikki at finna stað, staðfestir uttanríkisráðharrin.

Hann leggur afturat, at ráðið altíð hevur havt eina seriøsa síðu, og soleiðis skal tað halda fram.

# Uttanríkisdeildir avdúkað síni mál og mið

**Hóast Uttanríkisráðið hevur verið til í nærum tvey ár, so var tað ikki fyrr enn í gjár gjørligt hjá almenninginum at vita, hvat tær seks ymisku deildirnar í ráðnum gera**

UPPLÝSINGAR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Uttanríkisráðið hevur verið undir luppinum hjá miðlunum seinastu vikurnar, og nú er líkt til, at ráðið roynir at rudda eitt sindur upp, tí nú er heimasíðan dagførd, soleiðis, at tað ber til at síggja, hvat ymisku deildirnar í Uttanríkisráðnum hava ábyrgdina av.

Tað var 18. septembur, at Sosialurin ynskti at vita, hvørjar arbeiðsuppgávurnar hjá deildunum í Uttanríkisráðnum eru.

Onki svar kom, og seks dagar spurdi blaðið umaftur.

Nú kom svar sama dag.

Upplýst var, at ongi almenn skjøl vóru fyri uppgávurnar hjá ymisku deildunum, men hetta skuldi vera greitt áðrenn 1. oktobur, og tá skuldi teksturin leggjast á heimasíðuna hjá ráðnum.

Í gjár komu so hesir upplýsingar, so nú ber til at vita, hvør hevur ábyrgd av hvørjum í Uttanríkisráðnum.

### Teldur taka tíð

Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, staðfestir, at orsøkin til, at ongi almenn skjøl vóru fyri arbeiðsuppgávur í ráðnum er, at ein samanlegging var gjørd millum Samvit og Uttanríkisráðið.

– Áðrenn vit løgdu saman var greitt tilskilað, hvør deild hevði hvørja ábyrgd. Síðan samanleggingina hava vit roynt at hava starvsfólkini við, soleiðis, at býtið bleiv gjørt so rætt sum gjørligt. Vit hava jú skorið frá sjey deildum til seks, men allar uppgávurnar skulu røkjast.

Uttanríkisráðharrin leggur afturat, at orsøkin til, at upplýsingarnir ikki vóru teldutøkir er, at tað tekur sína tíð at gera ymiskt við teldum. Men tá teldurnar eru komnar at virka, so riggar væl.



*Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, staðfestir, at teldutøkni er ein av orsøkunum til, at tað ikki hevur borið til at vita, hvørjar uppgávur ymisku deildirnar í ráðnum hava*